# Dansur við LM Band

Almennur dansur við LM Band verður
21. august frá kl. 22.00 til kl. 02.00.
Forsølan byrjar 16. august
í Kunningarstovuni í Havn



Kostnaður 150,-

Dansifrøi



# Sethús á Strondum til sølu

**Eini sethús á Selvindsvegi 2 á Strondum verða hervið lýst til sølu.**

Húsini standa væl fyri í friðarligum umhvørvi. Frálíkt útsýni er yvir allan fjørðin og út á Eystnes.

Vídd á grundøkinum er uml. 440 fermetrar.

Húsini eru bygd í 1922 og eru í trimum hæddum, miðhædd, kjallari og loft. Hvør hæddin er uml. 54 fermetrar (uml. 9 x 6 mtr.), loftið tó nakað minni.

**Innrætting:**

**Miðhædd:** Køkur, kamar, 2 stovur, durur, gongd og baðirúm við brúsu.

**Loft:** Hjúnakamar, 2 smærri kømur, gongd/trappa.

**Kjallari:** Óinnrættaður. Góður møguleiki er fyri innrætting. Trappa er frá miðhædd til kjallara.

Húsini eru klødd av nýggjum, og vindeyguni eru skift í 2002 – 2004.

Til ognina hoyra tveir hjallar/hoyggjhús á uml. 15-16 fermetrar.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Heygum & Petesen, adv.**
Bøgøta 16, 100 Tórshavn
Tlf. 35 17 10, Fax 35 17 11
Teldupostadr: hp@adv.fo

Heygum & Petersen
advokatskrivstova

Advokatskrivstovan hjá Björn á Heygum & Alfred Petersen

Bøgøta 16 | postboks 164 | FO-110 tórshavn | Tlf. 351710 | fax 351711 | hp@adv.fo | www.adv.fo

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA

## Enn eru pláss eftir á hesum skeiðum, sum Søgu-og samfelagsdeildin bjóðar út í heyst

### Skeiðini kunnu eftir umsókn gerast partur av masterútbúgving

**Politisk umboðan (stjórnmálafrøði)**
***Stakskeið á masterstigi***
Skeiðið viðger ástøði um politiska umboðan, og tey lesandi læra at nýta hesi ástøði til at greina og lýsa viðkomandi dømi um politiska umboðan í Føroyum og umboðan av føroyskum áhugamálum í altjóða høpi.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í stjórnmálafrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar 15. september 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av stjórnmálafrøði ella javnmettum fakum.

Kostnaður kr. 5.500

**Organisatiónsástøði og almenn fyrisiting (stjórnmálafrøði)**
***Stakskeið á masterstigi***
Skeiðið viðger hvussu organisatiónir virka, og hvussu fólk ávirka og ávirkast av organisatiónum. Tey lesandi fáa grundleggjandi kunnleika um og yvirlit yvir meginrák í organisatiónsástøði, og samstundis innlit í granskingarøkið "almenn fyrisiting" (public management) og meginrák innan almenna fyrisiting.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í stjórnmálafrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar 9. september 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av stjórnmálafrøði ella javnmettum fakum.

Kostnaður kr. 7.500

**Føroysk Fiskirættindi í altjóða lóg (løgfrøði)**
***Stakskeið á masterstigi 10 ECTS***
Skeiðið viðger føroysk fiskivinnurættindi, sum tey verða ásett í altjóða høpi og eftir altjóða lóg. Tey lesandi fáa innlit í týðandi rættarkeldur og gransking á økinum, eins og grundleggjandi førleikar at meta um høvi og loysnir á altjóða tilfeingisspurningum, serliga tengdum at fiskivinnurættindum.

Stakskeiðið telur 10 ECTS á masterstigi, og ætlanin er, at skeiðið skal verða góðskrivað á komandi masterútbúgving í løgfrøði umframt masterútbúgving í samfelagsvísindum.

Undirvísingin byrjar 27. august 2010 og endar við munnligari próvtøku 8. oktober 2010.

Fortreytirnar fyri at skriva seg inn til skeiðið er útbúgving á bachelorstigi ella samsvarandi við nóg mikið av løgfrøði ella javnmettum fakum, eitt nú grundskeið í lóg.

Kostnaður kr. 5.500

---

Skeiðini eru treytaði av nóg stórari luttøku. Gjaldsskeið skulu gjaldast áðrenn skeiðsbyrjan. Lesandi innskrivað við Fróðskaparsetur Føroya ella við annan hægri lærustovn fáa tó skeiðið ókeypis.

Nágreiniligari lýsingar av skeiðunum finnast á www.setur.fo

Umsóknarblað fæst á www.setur.fo ella við at venda sær til Søgu-og samfelagsdeildina, J. Broncks gøta 25, 4.h., Tórshavn, tlf. 352580.

**Umsóknarfreistin er 25. august 2010 ella seinni, um pláss eru eftir.**

**FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA**
**Setursskrivstovan · tlf. 35 25 00 · J. C. Svabos gøta 14**
**Postrúm 272 · 110 Tórshavn · www.setur.fo**

Lesið Sosialin -so eru tit við!